MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Løgfrøðingur til Mentamálaráðið

**Áhugavert og fjølbroytt starv sum løgfrøðingur er leyst at søkja á Aðalskrivstovu Mentamálaráðsins. Starvið er tíðaravmarkað fram til 1. august 2019 við møguleika fyri fastari setan eftir hetta.**

**Starvið**
Sum løgfrøðingur í Mentamálaráðnum verða uppgávur tínar áhugaverdar og fjølbroyttar. Høvuðsuppgávurnar hjá løgfrøðinginum eru m.a. at fyrireika og tulka lógir, kunngerðir og reglur; at veita løgfrøðiliga ráðgeving og vegleiðing og at viðgera kærur í samráð við aðrar partar í Mentamálaráðnum. Eisini snýr arbeiðið seg um løgfrøðiliga góðskutrygging á málsøkjum Mentamálaráðsins. Talan er um starv í einum spennandi politiskum arbeiðsumhvørvi, og skalt tú vera før/ur fyri at kunna arbeiða undir einum ávísum trýsti.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava løgfrøðiligt kandidatprógv (cand. jur.). Tú skalt duga væl at orða teg á føroyskum, bæði í skrift og talu. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt umframt at arbeiða í toymi og arbeiðsbólkum. Tú skalt vera tænastusinnaður, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni. Tú skalt hava førleika at seta teg inn í nýggj viðurskifti og duga at miðla hetta víðari til onnur. Tað er ein fyrimunur, at tú hevur politiskt tev og áhuga fyri samfelagsviðurskiftum í síni heild.

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Setanarøkið fevnir um øll stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir teirra.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, CV og øðrum viðkomandi skjølum skal sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

ella við telduposti til: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi **mikudagin 20. juni 2018**. Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Poul Geert Hansen, aðalstjóra, á tlf. 555010 ella t-post PoulGeertH@mmr.fo. Eisini ber til at vitja heimasíðu okkara www.mmr.fo.

***Mentamálaráðið** fyrisitur málsøkini útbúgving, gransking og mentan og harundir eisini dagstovnaøkið, kirkjumál og onnur trúarsamfeløg, loftmiðlar, upphavsrætt, ítrótt og annað frítíðarvirksemi.*